# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ábyrgd fyri heimsbúskapi

Tjúgu av heimsins ríkastu londum við USA á odda, tey sonevndu G20 londini, hava hildið fund um búskaparligu støðuna í heiminum. Bakstøðið er sera álvarsama fíggjarkreppan, sum herfyri byrjaði í USA og síðan breiddi seg til allan framkomna heimin. Hóast niðurstøðurnar av fundinum vóru daprar, so vóru glottar at hóma í niðurstøðunum, sum londini samdust um.

Taka vit dapra partin fyrst, so var ein niðurstøðan, at fíggjarkreppan er eins álvarsom og tann ræðuliga kreppa, sum byrjaði í Wall Street í New York í oktober 1929 og sum skjótt breiddi seg til allan heimin. Tann kreppan bar við sær í fyrsta lagi fíggjarligt og búskaparligt skræðl og í øðrum lagi var tann kreppan við til at mynda forreytirnar fyri fasismuni og nazismuni. Hetta síðsta gongur ongantíð frá tilvitandi og ábyrgdarfullum politikkarum og er hetta ein orsøkin til, at lond, sum annars helst vilja lata marknaðarkreftirnar ráða, víkja frá sínum princippum og taka til planbúskaparlig ráð. Høvuðsniðurstøðan á fundinum var, at londini mugu taka ábyrgd av heimsbúskapinum í felag og at altjóðagerðin tørvar eitt sett av altjóða spælirreglum fyri fíggjarheimin, spælireglur, sum stjórnirnar skulu semjast um og eins og tær skulu ansa eftir, at hesar reglur vera hildnar. Leiðararnir fyri G20 londunum noyddust heilt einfalt at ásanna, at peningamarknaður er ein og tann sami um allan heim og verða ikki ásettar neyvar reglur fyri virkseminum hjá bankum, peningastovnum og íleggjarum, som kann eingin kenna seg tryggan, sjálvt ikki hitt mætasta stórveldi. Marknaðarbúskapur undir strongum almennum eftirliti nevndi Bush hesa nýggju skipan.

Víðari samdust G20 londini um at gera eina serstaka ætlan fyri Afrika, har búskaparstøðan í mongum londum støðugt versnar. Verður ikki nakað álvarsligt gjørt her og nú, kann hetta enda við einu búskaparligari og menniskjansligari katastrofu. Annars samdust leiðararnir fyri G20 londunum at hittast aftur um eitt ár til tess at eftirmeta støðuna og umhugsa, hvørt tørvur er á nýggjum átøkum. Samantikið var G20 fundurin ein glotti i eini daprari tíð, har nógv stúra fyri framtíðini. Hetta, at heimsins leiðarar ásanna, at kreppan loysir seg ikki av sær sjálvari, er hóast alt ein munur á dagsins fíggjarkeppu og Wall Street skrallinum, har tað gingu ár, áðrenn heimsins leiðarar ásannaðu, at hitt almenna noyddist at leggja uppí. Tann búskaparfrøðingur, sum best skilti hetta, var John Maynard Keynes og tað var eisini hann, sum sannførdi Roosevelt um, at statsvaldið átti at taka um endan og bjarga búskapinum. Við at bjarga búskapinum, bjargaði Roosevelt eisini amerikanska fólkaræðinum. Norðurlond og Bretland valdu somu kós og sluppu tí undan einaræðinum, hóast nøkur teirra vóru drigin uppí heimsbardagan. Tá hugsað verður um tað, sum hendi í 1929 og allar tær vanlukkur, ið harav stóðust, so bendir nógv hóast alt á, at vit hava lært av søguni og fara at sleppa heilskapað úr tí fíggjar- og búskaparkreppu, sum nú leikar á.

**Sosialurin**

## Sanering nú og samanlegging, ella kommunuskattin upp á 48 prosent

**PÁLL Á REYNATÚGVU**
borgarstjóri í Sands Kommunu



Landsmyndugleikarnir hava nú í longri tíð sett kikaran fyri blinda eygað, tá tað snýr seg um fíggjarliga ójavnan, sum setur kílar millum økini í landinum. Tað eru tó fleiri røddir, sum hava talað fyri millumkommunalari javning, uttan at nakað er komið burturúr higartil.

Búskaparligi uppgangurin hevur verið ógvuliga ymiskur seinnu árini. Vit hava kommunur, sum eru tiknar av fótum í viðgongd, meðan aðrar hava virkað stórt sæð óávirkaðar. Sum hava roynt at svara hvørjum sítt, herundir barst við gamla skuld frá nítiárunum.

Soleiðis eisini við Sands Kommunu, sum seinastu átta árini, hevur rindað u.l. 30 mió.kr í rentum og avdráttum. Tað er ikki so lítið, tí inntøkuan hjá kommununi í sama tíðarskeiði hevur verið góðar 90 mió.kr. Vert er at leggja sær í geyma, at tað var ein rættiliga niðurslitin kommuna, sum eg og mínir starvsfelagar yvirtóku fyri átta árum síðani. Saman við fólkinum her á Sandi, hava vit smátt um smátt endurbygt kommununa og tilboðini til borgaran, men við einum nærum slóknaðum parti av fiskivinnuni og einum lutfalsliga lítlum borgaraparti í besta arbeiðsaldri, so er uppgávan í dag, ógvuliga, ógvuliga møtumikil.

Hóast vit á ongan hátt havi verið í miðlunum og gramt okkum um støðuna, snøgt sagt tí at vit meta at tað ikki ger støðuna betri, so kenni eg meg nú, borgarinnar vegna, kroystan at gera vart við støðuna.

Sum lítil eind, hóast samanløgd, so hevur Sandoyggin ógvuliga truplar fortreytir í løtuni. Sandoyartunnilin fekk eitt skot fyri bógvin og tað hevur ikki gjørt støðuna betri.

Ætli mær tí at spyrja landsins myndugleikar, um tit fara at góðtaka at vit seta kommunuskattin til 48 % í eitt tvey ára skeið, fyri á tann hátt at niðurgjalda skuldina, sum annars er um at kvala kommunala raksturin, nú rentan er á veg uppeftir aftur...

...ella ætla tit at sanera hesar kommunurnar, sum ikki fingu lut í fíggjarligu viðgongdini, niður í eina hálva álíkning og harvið geva teimum fortreytir, sum gera tað gjørligt at yvirliva sum kommuna.

Tit hava eisini møguleikan at gera eina samhaldsfasta javningarskipan sum tryggjar at vit øll eru borgarar í Føroyum, við nøkulunda javnbjóðis fortreytum. Einki at gera, er at trýsta kommunurnar til kreativar loysnir og tað er neyvan til gagns fyri nakran.

## Opið bræv til Kringvarpið um valdekning

**SÍMUN P. POULSEN**
Fuglafjørður

**Býráðsvalini - Fólkið hevur talað**

Tann 11. november var býráðsval í Føroyum.

Tað munnu vera fá fólk, ið ikki settu seg framman fyri sjónvarpsglugganum hetta kvøldið. Tí tað er ásannandi, at øll eru sera spent uppá tílíkt val. Ikki einans at hoyra úrslitið frá síni egnu bygd ella býi, men frá øllum Føroyum. Tað kemur mest av tí, at ein kennur nógv valevnir í nógvum bygdum.

Eg var ein av teimum ið sat og lýddi á í sjónvarpinum. Har vóru nógvar áhugaverdar samrøður við fólk úr ymiskum bygdum. Og fleiri ferðir bleiv sagt, at vit venda aftur til Havnina og Klaksvíkar. Ein sá nærum runt allar Føroyar.

Men ein stórur býur bleiv ongantíð tikin uppá tunguna. Tað munnu vera fá fólk, ið ikki sótu frá klokkan 20 til tað var liðugt og væntaðu, at nú komu úrslitini úr Fuglafirði. Men Fuglafjørður bleiv ongantíð nevndur.

So allir hyggjarnir sótu sum kánus. Tí fari eg at seta niðanfyri nevndu spurningar.

1) Hví tók sjónvarpið ikki Fuglafjørð upp á tunguna?

2) Tað var ikki neyðugt at hava fólk frá tykkum á staðnum. Tit kundu bara ringt til valnevndina, so fingu tit úrslitið frá teimum!

3) Koma tit at útihýsa Fuglafjørð á komandi valum?

Til seinast vil eg ynskja sjónvarpinum við tess manning eina góða og eydnuberandi framtíð.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hognit@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.